# Alivinnan kennir seg órættvíst viðfarna

**Tað er órættvíst, at arbeiðarafeløgini serliga skulu leggja eftir alivinnuni, sum er so viðbrekin, og sum í flestu førum gevur hægri løn enn sáttmálin krevur, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag**

ALING
*Eyðun Klakstein*



*– Best hevði verið, um vit sloppu undan verkfalli, men vit kunnu ikki gera av, hvar arbeiðsfólkið hjá okkum er organiserað, sigur Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon*

Tað gongur so dánt at røkja alibrúkini, sum liggja í verkfalsrakta økinum, men fólk, sum varða av alivinnuni, halda, at verkfallið rakar tey órættvíst.

– Alivinnan er ein eym vinna og krevur góða røkt. Í løtuni klára vit so nøkunlunda at røkja alibrúkini, men stundum mangla vit tænastur, sum vit hava fyri neyðini, sigur Hans Jacobsen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag.

– Tað er órættvíst, at tað verður serliga lagt eftir alivinnuni, tá hendan vinnan er so viðbrekin og letur løn, sum oftast er væl omanfyri grundlønina hjá arbeiðarunum, sigur hann.

Hans Jacobsen sigur, at arbeiðsfólkið hjá alarunum fáa góða løn, tí arbeiðið er strævið og týdningarmikið.

– Eitt er at fiskavirkini verða løgd, men støðan er ein onnur hjá alarunum, tí verður fiskurin ikki allatíðina røktur, so kann tað fáa avleiðingar, tá hann skal takast, sigur Hans Jacobsen.

### Órímilig tiltøk

Stjórin á Vestsalmon tekur undir við hesum sjónarmiði, og hann heldur, at lønarstríðið í grundini einki hevur við alararnar at gera.

– Vit gjalda arbeiðsfólkunum á alibrúkunum løn, sum er á hædd við handverkaraløn, og tí kann tað tykjast løgið, at vit verða raktir av hesum verkfalli, sigur Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon.

– Eg skilji, at framleiðslan verður steðgað, men hinvegin er tað órímiligt, at vit ikki sleppa at røkja alibrúkini. Øll djór mugu røkjast, tí annars endar galið, og gongur hetta verkfallið útyvir fiskin hjá okkum, so kemur tað veruliga at kosta.

Eini 150 arbeiðsfólk hjá Vestsalmon eru í verkfalli, men Vestsalmon fær í løtuni røkt alibrúkini nøkunlunda. Støðan er tó trupul og kann versna.

– Í løtuni eru tað arbeiðsformenninir, sum eiga lívið í fiskinum, tí teir gera eitt risastórt arbeiði, nú verkfallið er, sigur Frímund Hansen.

Vestsalmon legði nógv fóður inn undir seg, áðrenn verkfallið byrjaði, men dregur verkfallið út, kann fóðri eisini gerast ein álvarsamur trupulleiki.

– Best hevði verið, um vit sloppu undan verkfalli, men vit kunnu ikki gera av, hvar arbeiðsfólkið hjá okkum er organiserað, sigur Frímund Hansen.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá formanninum í Føroya Arbeiðarafelag fyrrapartin í gjár.

# Hvidovre á Tórsvølli á Ólavsøku



*Óli Johannesen, her í dysti fyri Hvidovre, skal á Ólavsøku saman við liðfeløgum sínum spæla ímóti HB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Danska 1. deildarfelagið Hvidovre skal eftir ætlan spæla móti HB Ólavsøkuaftan. Møguliga verður heimsins besti málverji, Peter Schmeichel, við á liðnum saman við Óla Johannesen**

ÓLAVSØKA
*Stefan í Skorini*

Nógv virksemi verður á Tórsvølli á tjóðarhátíð føroyinga. Ólavsøkuaftan kemur danska fótbóltsfelagið Hvidovre á vitjan, og mótstøðuliðið hjá dønum verður HB. Ólavsøkudag verður so finalan í kappingini um Løgmanssteypið millum B36 og KÍ. Fótbóltsáhugað hava sostatt nógv at gleða seg til.

Sum skilst er næstan alt komið uppá pláss viðvíkjandi vitjanini hjá Hvidovre á Tórsvølli. Onkrir snøklar eru eftir, men væntandi verður liðið at síggja í Føroyum.

Orsøkin til at tað júst er Hvidovre, sum fekk innbjóðing man vera, at tvøråmaðurin Óli Johannesen dagliga spælir í felagnum. HB hevur fyrr havt vitjan úr Danmark á Ólavsøku, tá Herfølge við Jákupi Mikkelsen var á vitjan.

Líkt er til, at eigarin av hvidovre, Peter Schmeichel, verður við á ferðini, og hann fer at verja málið hjá Hvidovre. Peter Schmeichel, ið hevur verið kosin heimsins besti málverji, keypti barndómsfelag sítt fyri stuttum, og hann hevur ætlanir um at føra felagið upp í bestu deildina aftur.

Peter Schmeichel, ið dagliga spælir í Sporting Lissabon í Portugal, hevur tvær ferðir fyrr verið í Føroyum í fótbóltsørdinum. Síðst í áttatiárunum spældi hann við Brøndby á graslíkisvøllinum í Gundadali móti HB. Tá vann Brøndby 3-0.

Í fjør var hann so við danska landsliðnum, sum vann 2-0 á føroyska liðnum. Enn hevur hann hildið málið reint í Føroyum.

Tað eru óivað fleiri føroyingar, ið eru spentir um at síggja Hvidovre spæla. Felagið er ikki millum tey fremstu í Danmark longur, men fleiri eldri føroyingar minnast, tá Hvidovre var í uppá sítt besta.



# Vit stríðast til síðsta mann

**Seinastu dagarnar eru seiglívað tíðindi farið at ganga um, at Arbeiðarafelagið Hæddin í Runavík er so misnøgd við verkfallið, at tey ætla at taka seg úr Føroya Arbeiðarafelag. Hetta er tað bera tvætl, sigur formaðurin**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*– Vití Runavík taka fult undir við verkfallinum, sigur Karla Einarsson, formaður í arbeiðarafelagnum Hæddini. Tað gera suðuroyingar eisini. Mikudagin hevði Føroya Arbeiðarafelag fund á Tvøroyri fyri limunum í Suðuroy. Nógv fólk, eini 250 fólk møttu upp og góvu verkfallinum sín fulla stuðul*

– Hatta er tað reina tvætl.

– Karla Einarsson, formaður í arbeiðarafelagnum Hæddini í Runavík, vísir púra avgjørt tíðindunum aftur, sum eru farin at ganga um verkfallið.

Seinastu dagarnar eru seiglívað tíðindi farin at ganga um, at Føroya Arbeiðarafelag er við at moltna – við at fara í upploysing.

Eitt nú vilja tíðindi verða við, at limir í Føroya Arbeiðarafelag eru so misnøgdir við verkfallið, at tey ætla at taka seg úr felagnum.

Serliga skulu tað vera limirnir í Arbeiðarafelagnum Hædddini í Runavík, sum eru so illa foreintir við støðuna, at tey ætla at taka seg úr Føroya Arbeiðarafelag.

### Tað bera tvætl

Men hetta avsannar formaðurin í Hæddini upp á tað allar harðasta.

– Hatta er tað bera tvætl, sigur Karla Einarsson.

Hon sigur tvørturímóti, at tey eru sinnað at stríðast til síðsta mann fyri at vinna verkfallið.

– Vit hava givið Føroya Arbeiðarafelag okkara fulla stuðul í verkfallinum og tann stuðulin stendur við.

Hon sigur, at sjálv hevur hon onki hoyrt um hesi tíðindi.

– Nakað tílíkt hevur als ikki verið til umrøðu í felagnum yvirhøvur og tað passar yvirhøvur ikki. Vit hava ikki so frægt sum hugsa hendan tankan og enn minni lagt nakrar ætlanir um at taka okkum úr Føroya Arbeiðarafelag, sigur formaðurin.

Hon sigur, at limirnir í arbeiðarafelagnum eru tvørtur ímóti ógvuliga virknir í verkfallinum.

– Vit eru á skrivstovuni alt samdøgurið og vit hava somuleiðis nógvar verkfalsvaktir døgnið runt fleiri staðir, eitt nú í Kollafirði og aðrastaðni við.

Annars heldur Karla Einarsson ikki nógv um seinastu fráboðanina frá arbeiðsgevarunum um, at Føroya Arbeiðarafelag má gera sær púra greitt, at tey fara ikki at fáa meiri í løn enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, fáa, tí lønirnar skulu vera tær somu um alt landið.

– Tað vera tað tveir partar um at gera av. Og arbeiðsgevarin skal ikki billa sær inn, at teir kunnu avtala við aðrar partar, hvat vit skulu hava í løn. Hvussu kunnu teir vænta, at vit góðtaka tað, spyr Karla Einarsson.

Homn leggur dent á, at Føroya Arbeiðarafelag fer til samráðingar útfrá sínum sáttmála, eins og hini ferløgini samráðast út frá teirra sáttmála.

Tað, hon sipar til, er, at arbeiðarafeløgini tvíhalda um, at tá ið Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, skrivaði undir, lovaði arbeiðsgevarafelagið teimum, at Føroya Arbeiðarafelag skuldi ikki fáa meiri í løn.

Annars finst hon at, at arbeiðsgevarar ringja til arbeiðarafeløgini í tíð og úrtíð at biðja um undantaksloyvi til alt handa slag.

– Teir skuldu heldur ringt til sítt egna felag og biðið tað komið til samráðingar um tey krøv, vit hava sett fram, so at vit fingu gjørt ein sáttmála.

Hon sigur, at tað eru nógvir arbeiðsgevarar sum onki hava ímóti at betala meiri í løn.

–Eg dugi ikki at síggja, hví vit skulu hava skyldina av øllum avleiðingunum av verkfallinum. Vit verða ofta søgd at vera grundstuðlarnir undir samfelagnum. Hvørja ferð, vit eru í verkfalli í nakrar dagar kappast bæði politikarar og arbeiðsgevarar um at siga, at øll samfelagsins virði eru í vanda. Hví kunnu vit so ikki fáa meiri í løn, tá ið vit hava so ónatúrliga stóran týdning, spyr Karla Einarsson.

# Hurlivasi í Suðuroynni

**– Rættiligur hurlivasi tók seg upp í Suðuroynni hósdagin, tá ið boð brádliga vórðu givin um, at Smyril slapp ikki at sigla meiri tann dagin. Nógvar neyðloysnir máttu tí finnast, tí heilt nógv fólk skuldi norður um fjørð aftur**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*





*– Tað var nógv virksemið á Hvalbiarkei seinnapartin hósdagin, men ikki øll sluppu við, sum høvdu ætla sær, tí bjargingarútgerð skuldi vera til øll*

Tað kom sum eitt slag mitt í solar plexus hjá nógvum fólki, tá ið útvarpið á middegi hósdagin boðaði frá, at Smyril varð lagdur og slapp ikki at sigla norður aftur til Havnar seinnapartin, sum hann átti.

Heilt nógvir norðingar vóru í suðuroynni hendan dagin. Trý fótbóltslið vóru í Suðuroynni og harafturat var nógv fólk eisini komið norðaneftir at fylgja Erningi Magnussen av Tvøroyri.

Og so vóru tað øll tey, sum bara skuldu norðureftir. Ikki minst kom fjáltur á onkrar av fótbóltsspælarunum úr AB, sum høvdu verið í Hvalba og sparka, tí teir skuldu til provtøku í gjáramorgunin og máttu tí norður. Tað kom eisini fjáltur á áttanda flokk á Tvøroyri, sum skuldi við Norrønu í gjáramorgunin, tí tey skuldu til Danmarkar í setursúla. Eisini onnur høvdu gingu við pakkaðum kufferti og ferðaseðili til Norrønu í hondini og fingu døgverðan í rangastrúpan hendan góðveðurs hósdagin.

Harafturat vóru heilsølubilar og annað leyst og fast, sum helst vildu inn aftur á meginlandið seinnapartin hósdagin.

Tað er eisini søgan um porkeriskonuna, sum býr í Andorra. Seinastu 20 árini hevur hon verið heima einar 6-7 ferðir og tríggjar ferð er hon rakt av verkfalli og hevur verið noytt at finna alternativar loysnir fyri at sleppa til Havnar, so at hon slapp av aftur landinum. Og nú lá hon aftur føst í Suðuroynni og skuldi við Norrønu í gjáramorgunin.

Men sjálvdan eru fólk ráðaleys, tá ið tað leikar á. Tað vóru tey heldur ikki hesuferð.

Nógvar alternativir flutningsmøguleikar vórðu riggaðir til í eini handavending og á náttúrða høvdu fleiri bátar loyst frá landi í Suðuroy við kós ímóti Havnini, ella Sandoynni.

Eitt nú fóru bæði Rankin og Anita av Tvøroyri til Havnar og høvdu fólk við, m.a. skúlaflokkin, sum skuldi á setursúla. Steintór fór eisini av Hvalba um seks tíðina við nógvum fólki. Umborð á Steintóri var eisini pláss fyri porkeriskonuni, sum skuldi til Andorra, so eisini hesuferð slapp hon avstað.

Somuleiðis kom útróðrarbáturin Vesturberg av Sandi eisini til Sandvíkar eftir fótbóltsspælarum, sum skuldi aftur til Havnar.

Summir avhesum bátunum løgdu dent á, at teir gjørdu ikki verkfalsrakt arbeiði, tí teir skuldu til Havnar kortini í ymsum ørindum, sum tað ikki bar til at fáa avgreitt í Suðuroy, nú verkfall er og so lótu teir fólk sleppa við. Eitt nú skuldi onkur til Havnar at taka kassar. Summir av bátunum høvdu ikki bjargingarútgerð til fólkið, men tað varð útvegað av ørðum bátum í oynni, so at tann parturin ikki lá eftir.

Síðani hevur Strandferðslan boðað frá, at Smyrli sleppur at loysa aftur í morgun.

### Umhugsar endurgjald

Í gjár visti útvarpið at siga, at Strandferðslan var farin at rokna eftir, hvussu nógv hon hevði mist av inntøkum av verkfallinum.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni segði, at tey høvdu mist rættiliga nógvar inntøkur, tí skipini sluppu ikki at flyta farm og nú misti Smyril eisini inntøkur av ferðafólki.

Hann segði, at kanska fór Strandferðslan at krevja Føroya Arbeiðarafelag eftir endurgjaldi fyri missin.